Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í mentamálum

Evni: Brandskúlin (Trygdardepilin við Áir)

Spurningar:

1. Hvussu gongst við at flyta brandskúlan hjá Trygdardeplinum við Áir til Klaksvíkar?
2. Hvar er ætlanin, at skúlin skal verða staðsettur í Klaksvík?
3. Fylgja lærararnir við flytingini ?
4. Er leiðslan á Sjónámi tikin við upp á ráð í tilgongdini, ella undir hvørjum stovni skal brandskúlin verða?
5. Við Áir er m.a ein konstruktión av einum maskinrúmi, har venjingar verða gjørdar. Verður henda konstruktiónin flutt til Klaksvíkar, ella verður ein bygd av nýggjum ?

Viðmerkingar:
Tað vóru hugalig tíðindi fyri norðoyingar, tá tað frættist í síni tíð, at brandskúlin skuldi flytast til Klaksvíkar. Tað er tí sera áhugavert at fáa at vita, hvar málið liggur í løtuni. Somuleiðis er áhugavert at vita, hvar í Klaksvík brandskúlin skal staðsetast, soleiðis at roykurin frá honum ikki kann verða ein bági fyri grannar og onnur.

Á Løgtingi, 5. august 2022

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur